# SERSTØK BYGGISAMTYKT FYRI ÚTSTYKKING VIÐ MYLLUTJØRN

Broytt 13. februar 2017

Við heimild í 4, stk. 1, í løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir, verður ásett:

## ØKIÐ SAMTYKTARINNAR

**§ 1.** Økið, ið serstaka byggisamtyktin er galdandi fyri, er avmarkað, sum sýnt er á kortskjølum 1 og 2 og er partur av matr. nr. 138 a, Hoyvík.

## FRÁGREIÐING UM ØKIÐ

**§ 2.** Bústaðaendamál

*Stk. 1* Útstykkingin við Myllutjørn, eystanfyri Karlamagnusarbreyt er uml. 23.500 fermetrar til støddar. Henda útstykking liggur í einum A3 øki, sum sambært byggisamtyktini, kann nýtast til bústaðir.

*Stk. 2.* Útstykkingin við Myllutjørn hevur 64 grundøki, ið eru góðar 200 fermetrar til støddar. Samlaða grundøki er 300 fermetrar fyri hvørt, harav ein partur verður lagdur til fríøki, sokallað Tún. Túnini eru 3 í tali og liggja hesi við atgongd frá Karlamagnusarbreyt.

*Stk. 3.* Atgongd verður til alla útstykkingina frá Karlamagnusarbreyt og eru tað 3 atkomuvegir.

*Stk. 4.* Atkomuvegurin frá Karlamagnusarbreyt leiðir bilar og fólk inn til túnini, ið verða savnandi fyri býlingin. Frá túnunum verða tveir minni húsavegir inn til tey einstøku húsini. Øll felagsparkering, renovatión, møguliga postskipan, bilavask o.a. og spæl hjá yngri sum eldri verður miðsavna um túnini. Til hvørt túnið hoyra uml. 20 hús.

*Stk. 5.* Húsini standa á einum grundøki, ið er góðar 200 fermetrar til støddar. Byggifeltini til húsini eru 8,75 x 6,25 metrar til støddar umframt tilbygging, karnappar, svalar o.a. (sí § 4, stk. 3 og § 4, stk. 4) , úthúsini/bilhúsini eru umleið 7,0 x 4,25 metrar til støddar. Byggifeltir til húsini og úthúsini/bilhúsini verða staðsett sambært kortskjali 3.

## NÝTSLA ØKISINS

**§ 3.** Økið skal nýtast til búðstaðir. Eisini er møguligt at hýsa minni virksemi, ið eru flokkað í umhvørvisflokki 1 í Umhvørvisflokking fyri Vinnustykkir í Tórshavnar kommunu, samtykt 20. mars 2007, har tað verður mett ráðiligt av býráðnum.

## BYGGING, STØDD, STAÐSETING OG SNIÐ HÚSANNA

**§ 4.** Tað kann bert byggjast innan fyri byggifeltini, ið eru víst á kortskjali 3. Harumframt skal tað verða minst 5 m millum sethús og 1 m millum sethús og bilhús á egnum øki.

*Stk. 1.* Byggifelt 1 er til sethús:

1.1. Mest loyvda stødd mált uttan er 8,75 x 6,25 m.
1.2. Byggjast kann í 3 fullum hæddum.
1.3. Mest loyvda hædd er 9 m frá planeringshædd.
1.4. Uthang kann gerast 0,3 m út um byggifeltið, tó ikki í mark um húsini bert eru í einari hædd.
1.5. Húsasíða í mark skal verða 20 cm betongveggur í minst 3 m hædd, mált frá grannastykki. Hetta er tó ikki galdandi fyri hús nr. 8, 23, 38 og 54.
1.6. Loyvt er at klæða og bjálva betongveggin ímóti grannamarki treyta av at klædningurin ikki fer inn um grannamarki.[1]
Sí kortskjal 3 og 4.

*Stk. 2* Byggifelt 2 er til bilhús/úthús

2.1. Staðseting av bilhúsi/úthúsi er sambært kortskjali 1
2.2. Mest loyvda stødd mált uttan er 5,50 x 4,25 m.
2.3. Loyvast kann at útbyggja bilhús til 7,0 x 4,25 sambært korti 1 og 2
2.4. Grundstykkir har bilhús er nærri enn 5 m frá innkoyring skulu hava minst eitt parkeringspláss frammanfyri serhúsini
2.5. Byggjast kann í einari hædd.
2.6. Mest loyvda hædd er 4,50 m mált frá planeringshædd, tó er mest loyvda hædd móti granna 2,5 m.
2.7. Síða í mark skal verða 20 cm betongveggur í 2,5 m hædd. Hetta er tó ikki galdandi fyri hús nr. 15, 30, 45 og 64
2.8. Tak skal verða minst BD-húsalutur 60. Hetta er tó ikki galdandi fyri hús nr. 15, 30, 45 og 64
Sí kortskjal nr. 3 og 4.

[1] §4, stk. 1.6 er sett inn 16. september 2013

*Stk. 3.* Byggifelt 3 er til tilbygging, karnappar, svalar o.a.

3.1. Mest loyvda støδd mált uttan er 1 x 3,25 m.
3.2. Byggjast kann í øllum 3. hæddum.
Sí kortskjal 3 og 5.

*Stk. 4.* Byggifelt 4 er til tilbygging, karnappar, svalar o.a.

4.1. Mest loyvda støδd mált uttan er 1 x 3,25 m innanfyri byggifeltið.
4.2. Byggjast kann bert í 2. og 3. hædd.
Sí kortskjal 3 og 5.

Stk. 5. Loyvt er at byggja altan ímillum byggifelt 3 og byggifelt 4

5.1 Altanin kann í mesta lagi verða 1 m djúp

*Stk. 6.* Loyvt er at byggja veggir báðu megin høvuðshurðina á veghædd, sum verju ímóti vindi.

6.1 Veggirnir kunnu bert verða innanfyri byggifelt 4.
6.2 Ikki er loyvt at inniloka hendan part[2]

*Stk. 7.* Nýtslustigið fyri sethús kann í mesta lagi verða 0,60 úthús/bilhús telur ikki við í útrokningini fyri nettonýtslustigið.

*Stk. 8.* Tað verður í avmarkaðan mun loyvt at hava vindeygu og onnur op ímóti marki.

7.1. Húsasíða í mark kann ikki hava vindeygu á 1. hædd og bert omanfyri 1,5 m yvir gólvið á 2. og 3. hædd. Hetta er tó ikki galdandi fyri hús nr. 8, 23, 38 og 54.
7.2. Vindeygu í húsaenda ímóti koyrivegi skulu vera í minsta lagi 0,9 m omanfyri gólvi á 1. hædd.
7.3. Vindeygu í húsaenda ímóti fríøki og gøtu, felagsøkini undantikin, skulu vera í minsta lagi 0,6 m omanfyri gólvi á 1. hædd.
Sí kortskjal 2 og 6.

## ÚTSJÓND HÚSANNA

**§ 5.** Øll bygging í økinum, sum serstaka byggisamtyktin fevnir um, skal gerast í samráð við byggivaldið.

*Stk. 2.* Kommunan skilar sær rætt til at seta krøv til útsjónd av húsum og úthúsum/bilhúsum í sambandi við út- og umbygging ella nýbygging.

---

[2] §4, stk. 5, 5.1 og 5.2 eru settar inn 16. september 2013

## BYGGIMYNDUGLEIKI OG ÁTALURÆTTUR

**§ 6.** Byggimyndugleiki og átalurættur eru sambært hesi byggisamtykt hjá Tórshavnar býráð einsamøllum.

## UNDANTAKSLOYVI FRÁ BYGGISAMTYKTINI OG BROYTINGAR

**§ 7.** Smávegis læittar frá reglunum í hesi byggisamtykt kann byggivaldið geva loyvi til, um so er, at dámur á økinum, sum byggisamtyktin roynir at skapa ella varðveita, ikki verður broyttur av teirri orsøk.

*Stk. 2.* Broytingar í byggisamtyktini kunnu verða gjørdar eftir samtykt býráðsins og góðkenning landsstýrisins eftir reglum um samtykt og góðkenning av nýggjum byggisamtyktum.

| HEILSU -OG INNLENDISMÁLARÁÐIÐ | |
|---|---|
| Mál nr.: | 16/01400 |
| Ætlanarskriv: | 8/2 - 2017 |
| Góðkent: | 21/2 - 2017 |
| Váttað: | [signature] |



# SERSTØK BYGGISAMTYKT:
# "Útstykkingin 200" við Myllutjørn

A: Sethúsabygging

Kortskjal 1
Góðkend 02.01.2008
Seinast broytt: 13.02.2017

# Kortskjal 2

Edited by Foxit Reader
Copyright(C) by Foxit Software Company,2005-2007
For Evaluation Only.



Vindeygu 0,9 m upp frá gólvi á 1 hædd. § 4, stk. 6,2
Vindeygu 0,6 m. upp frá gólvi á 1. hædd. § 4, stk 6,3
Eingi vindeygu á 1. hædd. 1,50 m upp frá gólvi í 2. og 3. hædd. § 4, stk 6,1
Vindeygu 0,6 m upp frá gólvi á 1. hædd. § 4, stk 6,3




| | |
|---|---|
| **Tórshavnar Kommuna** Býarskipanardeildin | |
| **Heiti:** | Serstaka byggisamtyktin "við Myllutjørn" |
| **Undirheiti:** | Serkort til viðkan av bilhús/úthús, við mátum |
| **Viðmerking:** | Kortskjal 3 |
| | |
| **Dagur:** 13.02.2017 | **Journal nr:** 16/01991 — **Tekna:** JBH/KF |

# Kortskjal 4


C.
D.
B
A.


TAK MINST
BD-HÚSALUTUR 60
4,5 m
2,5m
3,00 m
BETONG
9,00 m
BILHÚS/ÚTHÚS
SETHÚS

# Kortskjal 5




HÚSAENDI MÓTI HAVA, A.




HÚSASÍÐA MÓTI HAVA, B.

# Kortskjal 6




HÚSAENDI Í MARK, C.

X 90 cm móti vegi
Y 60 cm móti götu og friðøki




HUSASÍÐA MÓTI MARK, D.

- móti granna og felagsøki

HEILSU- OG INNLENDISMÁLARÁÐIÐ

Tórshavnar kommuna
Postsmoga 32
110 Tórshavn

21. februar 2017
**Mál:** 16/01263-8
**Tygara Skriv:**
**Viðgjørt:** KHP

***Góðkenningarskriv***

**Broyting í serstøku byggisamtyktini fyri útstykking við Myllutjørn**

Eftir reglunum í løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir, hevur Tórshavnar kommuna í skrivi, dagfest 10. november 2016, sent Heilsu- og innlendismálaráðnum uppskot til broyting í serstøku byggisamtyktini fyri útstykking við Myllutjørn til góðkenningar.

Broytingin snýr seg um at loyva at bilhús/úthús verða størri, og at loyvt skal verða at byggja svala.

Broytingin hevur ligið alment frammi frá 26. september til 17. oktober 2016. Tá freistin at koma við møguligum broytingaruppskoti ella mótmæli var farin, 7. november 2016, hevði kommunan einki mótmæli ella broytingaruppskot móttikið.

Býarskipanarnevndin hevur havt málið til ummælis og mælir í ummæli sínum, dagfest 26. januar 2017, til, at broytingin verður gingin á møti.

Heilsu- og innlendismálaráðið tekur undir við viðmerkingunum frá Býarskipanarnevndini.

Vísandi til omanfyri standandi verður sagt frá, at Heilsu- og innlendismálaráðið við heimild í § 4 í býarskipanarlógini góðkennir broytingina í serstøku byggisamtyktini fyri útstykking við Myllutjørn.

Hjálagt rættaður byggisamtyktartekstur fyri serstøku byggisamtyktina fyri útstykking við Myllutjørn við átekning frá Heilsu- og innlendismálaráðnum.

Vegna Heilsu- og innlendismálaráðið

Hilmar Høgenni
deildarstjóri

Eirargarður 2 • FO-100 Tórshavn
Tel: +298 304050 • Fax: +298 304025 • E-mail: himr@himr.fo